# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 8/2024**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: B71 kærir TB fyri ólógliga skiftan av leikara í einum fjórða ikki heimilaðum útskiftingarsteðgi** | |
| Deild: 1. deild, menn | Hvør hevur reist málið: B71 |
| Kapping: Landskapping | Kæra móttikin í Aga- og Etiskunevndini: 20. okt. |
| Møguligt brot framt: 5. oktober 2024 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

**Úrskurður**

Aðalumsitingin hjá FSF hevur í síni avgerð álagt TB kr. 5.000.- í bót fyri umsitingarliga óskilið við fjórða skiftinum og avgjørt, at dystarúrslitið millum TB-B71 í dystinum 5. oktober 2024 skal standa við. B71 hevur kært avgerðina um, at dystarúrslitið skal standa við.

Aga- og Etiskanevndin staðfestir, at TB við umbidna fjórða skiftimøguleikanum og leikaraskiftinum í 96. minutti, hevur framt brot á reglu 3, stk. 2 í Fótbóltslógini um mest loyvdu skiftimøguleikar.

Aga- og Etiskanevndin hevur í síni viðgerð einans viðgjørt kæruna um, hvørt dystarúrlsitið skal standa við ella um óheimilaði útskiftingarmøguleikin skal hava aðra avleiðing.

Aga- og Etiskanevndin metir, at av tí at fjórði óheimilaði útskiftingarmøguleikin varð brúktur í 96. minutti - sum er tríggjar minuttir fyri dystarlok - og dómarin legði leiktíð afturat fyri hesa skifting eins og dómarin legði tíð afturat fyri leikaraskiftið, sum B71 framdi í 94. minutti, eru lítil sannlíkindi fyri, at skiftingin hevði týðandi ávirkan á dystarúrslitið.

Tí er niðurstøðan, <u>at</u> avgerðin hjá Aðalumsiting FSF's um at leikliga dystarúrslitið skal standa við, staðfest.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

B71 kærdi TB fyri at brúka fleiri útskiftingarmøguleikar enn teir tríggir loyvdu fyri at skifta ein leikara móti endanum av dystinum millum TB-B71, leiktur 5. oktober 2024.

Kæran varð løgd fyri Aðalumsitingina hjá FSF til støðutakan og 12. oktober kom Aðalskrivstovan, í samráð við Kappingarnevnd FSF's, stutt sagt til hesa niðurstøðu í málinum:

- fjórða útskiftingin hevði ikki týðandi ávirkan á endaliga úrslitið á dystinum
- talan var um innskifting av fjórða leikara av í mesta lagi fimm loyvdum leikarum
- TB hevur gjørt ein fyrisitingarligan feil við ikki at fylgja við í tali av brúktum útskiftingarmøguleikum
- TB varð álagt bót á 5.000,- kr. fyri umsitingarligt óskil
- endaliga úrslitið av dystinum, sum TB vann 2-1, skal standa við

Aðalumsiting FSF's gav B71 kæruvegleiðing um, at málið kundi kærast til Aga- og Etiskunevndina sambært § 4, stk. 3, bókstav e í Aga- og Etiskureglugerðini. Henda kærumøguleika hevur B71 gjørt brúk av innanfyri kærufreistina.

Í kæruni um avgerðina hjá FSF Aðalumsitingini vísir B71 yvirhøvur á, at

- óheimilaða útskiftingin í 96. minutti elvdi til drál
- ein og hvør útskifting so seint í dystinum hevur neiliga ávirkan á spælið sum heild og gevur útskiftandi liðnum heimild at finna stevið aftur, um tey eru undir trýsti
- fjórði støðgurin er ein órættur, sum er framdur móti B71 og at minuttirnir aftaná ikki áttu at verið spældir
- síggjast skal burtur frá øllum, sum fór fram aftaná ólógligu útskiftingina, tí støðgurin var ólógligur og tí var innskifti leikarin eisini ólógligur
- mistakið við at loyva eina innskifting í einum fjórða steðgi elvir til óvissu um, hvat kundi, og burdi hent, restina av dystinum og hetta leyst av, hvat ólógligi leikarin gjørdi ella ikki gjørdi
- tað er orðaskvaldur, tá FSF Aðalumsitingin vísir á, at leikarin hjá TB í fjórðu innskifting í fjórða steðginum hevði verið lógligur, um innskiftingin ikki varð gjørd í einum ólógligum steðgi
- niðurstøðurnar í teimum trimum fordømum, sum FSF Aðalumsitingin vísir á, ikki eru rættar og at tær eru grundaðar á, í hvussu stóran mun innskiftingar hava ávirkan dystin eitt mál er í Italia, har eitt lið var dømt at tapa dystin 3-0 fyri at hava innskift seks leikarar uttan at tað var hugt at, hvørja ávirkan skiftingin hevði á leikgongdina

TB hevur í síni partshoyring mótvegis Aðalumsiting FSF's viðurkent og harmast sín umsitingarliga feil við fjórðu innskiftingini í 96. minutti og hevur víst á, at felagið ikki hevði framt hesa innskifting, um tey høvdu verið varug við, at innskiftingin varð ólóglig, tí TB førdi 2-1, tá innskiftingin varð gjørd.

TB vísir eisini á, at dómaratoymið eigur høvuðsábyrgdina av, at innskiftingin varð loyvd, tí bara dómarin kann loyva skiftingum at fara fram. TB undrast eisini á, at linjuverjin ikki legði til merkis at tala var um innskifting í fjórða steðgi, tá viðkomandi noteraði hesa í blokkin. Tað var ikki fyrr enn 1 tíma eftir dystarlok, at dómararnir gjørdu TB varug við feilin og at hetta mátti fráboðast FSF.

TB vísir annars á fýra fordømi, har ein av órøttum loyvd útskifting ikki fekk ávirkan á sjálvt dystarúrslitið eftir at kærur vóru reistar og kærumálini viðgjørd og avgjørd.

TB hevur eisini latið FSF video av dystinum, sum vísir framdu útskiftingarnar í longdu leiktíðini. TB hevur við stuðul í hesum yvirhøvur víst á, at

- fjórða innskiftingin hjá TB í 96. minutti tók 22 sekund at avgreiða og at talan ikki var um nakað drál
- B71 framdi eina innskifting í 94. minutti
- fjórða innskiftingin í 96. minutti skapti ikki nakranfyrimun fyri TB
- TB ikki oyðilegði nakran framburð ella momentum fyri B71 við fjórðu innskiftingini

TB vísir annars á, at ein av teirra leikarum fekk ein skaða í høvdi í 6. minutti og tí varð hann útskiftur vegna vanda fyri heilaskjálvta, sum eisini varð staðfest av lækna á sjúkrahúsinum sama dag.

**Dómarin** hevur í síni frágreiðing víst á, at TB nýtti fýra útskiftingar í fýra steðgum og at tað er tann fyrsta útskiftingin í 6. minutti, sum ikki varð skrásett í Comet "live" á dystardegnum.

Dómarin vísir tó eisini á, at hetta ikki er orsøkin til mistakið við fjórða steðginum, har fjórða útskiftingin varð framd. Dómarin viðurkennir sítt mistak at loyva TB 4. steðgin í 96. minutti. Góðar tríggjar minuttir seinni, varð dysturin bríkslaður av og dystarúrslitið var óbroytt.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til §§ 2-5 í Aga- og Etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og Etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Tað framgongur av upplýsingunum í málinum, at feilurin við fjórðu innskiftingini ikki gerst týðiligur fyri dómarnarnar fyrr enn aftaná dystin, tá innskiftingarnar skulu førast inn í Comet-skipanina. Orsakað av hesum, letur dómarin FSF fráboðan um tilburðin.

Tað er TB, sum fremur sína fjórðu skifting í einum fjórða steðgi inni í 96. minutti í yvirtíðini, tá støðan er 2-1 til TB.

Dysturin endar í 99. minutti, tí dómarin legði tíð afturat fyri innskiftingarnar í yvirtíðini. Leikliga úrslitið av dystinum gjørdist 2-1 til TB.

**Lógarverkið**

§ 3 í Fótbóltslógini frá 2024, á enskum Laws of the Game frá IFAB, ásetur, at tað í mesta lagi er loyvt hvørjum liði at nýta tríggjar skiftingarmøguleikar undir hvørjum dysti til í mesta lagi fimm leikaraskifti. Leikaraskifti, sum verða framd í hálvleikinum, telja ikki sum ein brúktur skiftingarmøguleiki. Leikaraskifti fyrstu 90 minuttirnar og í minuttinum, sum verða lagdir afturat av dómaranum, telja. Fremja bæði liðini leikaraskifti í sama steðgi, telur steðgurin sum ein brúktur skiftingarmøguleiki fyri hvørt av liðunum.

Fótbóltslógin ásetur eisini greiðar reglur fyri, hvør mannagongd skal nýtast, tá skift verður út. Ásett er í reglu 3, nr. 3 at dómarin "skal vita nøvnini á øllum eykaleikarum, áðrenn dystarbyrjan" og at dómarin "skal hava boð, áðrenn skift verður út". Harumframt skal dómarin bæði loyva útskifta leikaranum at fara av leikvølli og innskifta leikaranum at koma inn á vøllin.

Sambært reglu 5, nr. 2 í Fótbóltslógini, eru avgerðir dómarans endaligar, sí hetta reglubrot:

> *"Avgerðir dómarans viðvíkjandi tí, sum er hent í dystinum, eru endaligar. Hetta er eisini galdandi, um eitt mál er skorað ella ikki, og tað sama er úrslitið av dystinum. Avgerðir dómarans, og hjá øllum hinum dystarleiðarunum, skulu altíð virðast."*

Grein 9, stk. 1 og stk. 5 í FIFA Disciplinary Code áseta:

> *"Stk. 1. Decisions taken by the referee on the field of play are final and may not be reviewed by the FIFA judicial bodies.*
> *Stk. 5. The provisions of this Code relating to protets against match results affected by a referee's decisions that was an obvious violation of a rule remain applicable."*

Heimildartíðarskeiðið hjá dómaranum at nýta agarevsing í sambandi við dyst, røkkur frá tí dómarin fer á vøllin at kanna vøllin, áðrenn dystarbyrjan og til dómarin fer av vølli eftir dystarlok. Hetta er ásett í reglu 5, nr. 3, 3. reglubrot í Fótbóltslógini, sum er soljóðandi:

*"Hevur heimild at nýta agarevsing, frá tí hann fer á vøllin fyri at kanna hann undan dystarbyrjan, og inntil hann fer av vølli eftir dystarlok (íroknað brotssparkskapping). Um ein leikari ger eitt brot, sum førir til útvísing, áðrenn dómarin er komin á vøllin við dystarbyrjan, kann dómarin sýta leikaranum at luttaka í dystinum (sí § 3.6). Dómarin letur inn frágreiðing um allan annan rangan atburð."*

Sambært grein 28, stk. 3 og 4 í Kappingarreglunum, hevur dómarin ábyrgd av at avgreiða skrásetingar av leikaraskiftum o.a. á dómaraseðilinum í Comet-skipanini mótvegis FSF:

*"Stk. 3. Eftir leikbyrjan er bert loyvt at seta skotin mál, úrslit, skiftingar, ávaringar, útvísingar og viðmerkingar.*
*Stk. 4. Dómaraseðilin skal avgreiðast av dómaranum umvegis skrásetingarskipan FSF's. Skrásetingin skal vera framd í seinasta lagi 2 tímar eftir dystin. Hetta er galdandi fyri tær deildir, har FSF ásetur dómarar."*

Heimildirnar hjá Aðalumsitingini hjá FSF og hjá kærumyndugleikunum hjá FSF at viðgera mál um møgulig brot á fótbóltsregluverkið, eru ásettar í Aga- og Etisku reglugerðini hjá FSF. Staðfest kann, at Aðalumsitingin hjá FSF hevur heimild at viðgera mál av hesum slagi og at avgerðir hjá Aðalumsitingini kunnu kærast til Aga- og Etiskunevndina.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og Etiskanevndin staðfestir, at TB brúkti fýra útskiftingarmøguleikar til at gera fýra leikaraskifti í dystinum móti B71 og at tann fjórði skiftmøguleikin varð umbiðin í 96. minutti og eftirlíkaður av dómaranum.

Aga- og Etiskanevndin staðfestir, at dómarin av misgávum eftirlíkar TB umbønini um ein fjórða skiftimøguleika, so at TB fær framt eitt leikaraskifti í 96. minutti. Eitt mistak, sum dómarin gerst varugur við umleið 1 tíma eftir dystarlok. Tá gerst greitt fyri dómaranum, at innskiftingin hjá TB í 6. minutti, ikki er skrásett. Staðfest verður eisini, at í 94. minutti framdi B71 eina skifting.

Aga- og Etiskanevndin staðfestir eisini, at hóast TB kann skjalprógva, at útskifti leikarin í 6. minutti varð tikin út vegna skaða í høvdið, og leikarin sama dag fekk læknaváttan um heilaskjálvta, so kann henda útskifting kortini ikki flokkast sum ein sonevnd "heilaskjálvtaútskifting", við teirri avleiðing, at tann útskiftingin ikki skuldi telja við. Ein slík mannagongd krevur, at reglur um "heilaskjálvtaútskifting" í Laws of the Game frá 1. juli 2024, verða implementeraðar at galda fyri kappingar fyriskipaðar av FSF og at ásettar mannagongdir fyri slíkum skiftingum verða fylgdar.

Aga- og Etiskanevndin staðfestir tí, at TB hevur framt brot á grein 3 í fótbóltslógini við at umbiðja og gera brúk av einum óheimilaðum fjórða skiftmøguleika í 96. minutti. Aga- og Etiskanevndin staðfestir eisini, at tað er eitt mistak hjá dómarunum, at eftirlíka TB umbønini um at gera brúk av einum fjórða skiftimøguleika har eitt fjórða leikaraskifti varð framt í 96. minutti.

Prógvfast er, at dómararnir gjørdist varugur við mistakið eftir dystarlok. Avgerðin hjá dómaranum at loyva fjórða skiftimøguleikan til TB er endalig og stendur við.

Eftir er at meta um, hvør rættarfylgjan skal vera av, at TB gjørdi brúk av einum ikki heimilaðum skiftimøguleika til at fremja sítt fjórða leikaraskifti í 96. minutti.

Fordømi eru í norðurlondum og Írlandi um, at dystarúrslitið stendur við, tá talan er um brot á grein 3 í Laws of the Game, sum áseta, at eitt felag í mesta lagi kann brúka tríggjar skiftimøguleikar til í mesta lagi fimm leikaraskifti. Í øllum teimum nevndu fordømunum er talan um brúk av einum ikki heimilaðum fjórða útskiftingarmøguleika til at skifta ein av fimm eykaleikarum inn. Í flestu førum er eisini talan um eitt brot, sum verður framt bert fáar minuttir fyri dystarlok. Í nevndu fordømunum varð mett, at dystarúrslitið skuldi standa við heldur enn at dystur skuldi leikast umaftur. Í summum fordømum er ein meting eisini gjørd av, um ikki heimilaði skiftimøguleikin mátti metast at hava havt týðandi ávirkan á leikgongdina og á dystarúrslitið.

Aga- og Etiskanevndin metir, at tað er ikki uttan týdning at meta um, <u>nær</u> í dystinum óheimilaði skiftimøguleikin er brúktur og at gera eina <u>ítøkiliga meting</u> av, um mistakið sannlíkt hevði ávirkan á dystarúrslitið.

Í nevnda dysti kann staðfestast, at tvey leikaraskifti vórðu gjørd um sama mundi móti endanum av dystinum. B71 fremur eitt skifti í 94. minutti og TB sítt óheimilaða skifti í 96. minutti og dystur endar í 99. minutti. Staðfestast kann, at dómarin legði leiktíð afturat fyri bæði leikaraskiftini.

Aga- og Etiskanevndin leggur dent á, at hóast haldgott grundarlag ikki er fyri at staðfesta, at óheimilaða leikaraskiftið hevur givið TB ein týðandi ítróttarligan fyrimun seinastu minuttirnar av dystinum, so kann slíkt umsitingarligt óskil máa grundarlagið undir góðum fótbóltsanda og væntanum um fair play í øllum kappingum fyriskipaðar undir FSF.

Aga- og Etiskanevndin metir, at lítil sannlíkindi eru fyri, at óheimilaða skiftingin í 96. minutti hevði týðandi ávirkan á dystarúrslitið. Tí skal dystarúrslitið standa við og avgerðin hjá Aðalumsiting FSF's verður tí staðfest.

**Kæruvegleiðing**

Úrskurðurin um, at leikliga dystarúrslitið skal standa við, kann sambært grein 10 í Aga- og Etiskureglugerðini ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 25. oktober 2024**

Anni á Hædd

**Anni á Hædd**
**forkvinna**

Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, næstformaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi.